

*Tríggir vælnøgdir floksformenn á tíðindafundi í løgtinginum leygardagin, Jenis av Rana, Jóannes Eidesgaard og Høgni Hoydal*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

fylgja teimum tilmælum, sum málstevnunevndin á vetri 2007 setti fram í sínum tilmæli. Serligur dentur verður lagdur á at fáa til vega føroyskt ella føroyskað tilfar til børn og ung.

*Kringvarp Føroya*
Ein heildarmeting verður gjørd av Kringvarpi Føroya. Hølisviðurskiftini hjá Kringvarpi Føroya verða avgreidd við støði í hesi eftirmeting.

Public-service sáttmáli, sum er ein tíðaravmarkað menningarætlan við greiðum málum fyri Kringvarp Føroya, verður gjørdur millum Kringvarp Føroya og Mentamálaráðið.

Sendinetið hjá Kringvarpi Føroya verður endurnýggjað.

Kringvarpsgjaldið verður kravt inn gjøgnum skattaskipanina. Sergjaldsskipan um kringvarpsgjald verður gjørd fyri tey, sum hava skattafríar nettoinntøkur.

*Mentanargrunnurin*
Viðtøkurnar fyri Mentanargrunnin verða endurskipaðar soleiðis, at hann verður rumsáttari og virkisøkið verður víðkað til fleiri listagreinir. Ein fíggjarlig menningarætlan verður gjørd fyri grunnin samsvarandi tí tilmæli, sum gjørt var í upprunauppskotinum fyri Mentanargrunnin. Týðaragrunnur verður skipaður sum ein konta á fíggjarlógini, men verður umsitin av Mentanargrunninum. Tónlistargrunnur verður skipaður á sama hátt.

*Listafólk*
Skipan verður ment, ið kann veita listafólkum rættindi sum yrkisbólkur.

*Tjóðpallur Føroya*
Bygt verður tjóðleikhús, sum skal verða karmur um virksemi hjá fleiri listargreinum.

*List í almennari bygging*
Ásett verður, at ein ávísur partur av útreiðslunum til almenna og kommunala bygging verður markaður til list.

*Bókasøvn*
Bókasavnslógin verður endurskoðað og ment.

*Savnspolitikkur*
Skipaður verður ein savnspolitikkur, ið eisini hevur til endamáls at raðfesta nýggjar karmar kring almennu søvnini, sum í dag húsast undir trongum og óhóskandi korum.

*Musikk- og listaskúli*
Musikkskúlaskipanin verður styrkt.

*Varðveiting av fornminnum*
Sum upprunaliga ætlað, verður altjóða arkitektakapping skipað um framtíðina hjá Kirkjubømúrinum

*Ungdómsmentan*
Orðaður verður ungdómspolitikkur fyri ítrótt, tónleik, list og aðra ungdómsmentan.

## Útbúgving

Skal føroyska samfelagið mennast, fráflytingin steðgast og búskapurin vaksa, er neyðugt at raðfesta útbúgving heilt frá fólkaskúla fram til universitet.

*Fólkaskúlin*
Fyritreytin fyri ætlanini um at hækka útbúgvingarstøðið í landinum er ein góður fólkaskúli. Tí verða hesi stig tikin: Nevnd verður sett at endurskoða fólkaskúlalógina, læraraútbúgvingin verður lyft upp á kandidatstig, skipað eftirútbúgving av lærararum verður sett í verk, átøk verða gjørd til tess at fáa til vega meira av føroyskum undirvísingartilfari, byrjanarundirvísingin verður styrkt við at skipa tvílæraraskipan í fyrsta flokki, KT-undirvísingin í fólkaskúlanum verður styrkt, undirvísingarportalur verður skipaður.

*Íløgur í skúlabygningar*
Útbygging og bygging av miðnámsskúlum heldur fram.

*Universitet*
Gjørd verður ætlan fyri, hvussu vit økja munandi um tilboðini innan hægri lestur og gransking í Føroyum og fáa útlendsk lesandi til Føroya. Fróðskaparsetur Føroya verður ment til eitt kappingarført universitet. Neyðug játtan verður givin til at seta í verk útbúgvingartilboð, sum eru klár at seta í verk á Fróðskaparsetri Føroya.

Læraraskúlin, Vinnuháskúlan og Sjúkraróktarfrøðiskúlin verða lagdir saman við Fróðskaparsetri Føroya.

*Eftirskúli*
Arbeitt verður víðari við ætlanini at byggja eftirskúla.

*Útbúgvingarstuðul*
Lestrarstuðulin fyri stakar uppihaldarar verður hækkaður. ÚS verður endurskoðaður saman við avvarandi feløgum hjá teimum lesandi.

*Førleikagevandi útbúgvingar kring landið*
Skipaðar verða útbúgvingar kring landið, har vaksin kunnu taka førleikagevandi útbúgvingar.

*Sernámsfrøði*
Námsserfrøðiliga ráðgevingin kring landið verður styrkt.

*Skúlin á Trøðni*
Skúlin á Trøðni verður umskipaður og styrktur í samráð við leiðslu, starvsfólk og foreldur at børnum, sum ganga á skúlanum.

*Heildartilboð*
Greiningarmiðstøð fyri børn við serligum tørvi verður skipað í samstarvi millum Mentamálaráðið og Almanna- og heilsumálaráðið.

*Dagstovnar*
Til tess at skapa eitt heildartilboð til børn undir- og í skúlaaldri verður dagstovnaøkið lagt undir mentamálaráðið.

## Heilsumál

Heilsupolitisku aðalmálini hjá samgonguni eru at styrkja okkara heilsuverk, so tað kann veita øllum sjúklingum størri trygd og betri dygd í fyribyrgjandi, viðgerandi og røktarligum heilsutænastum, eins og fremja ein fólkaheilsupolitikk, sum miðar eftir at styrkja almennu heilsustøðuna hjá føroyingum.

Dygdarmenning av sjúkrahúsverkinum
Dygdarmenning av føroyska sjúkrahúsverkinum skal verða framd sambært álitinum um framtíðar sjúkrahúsverk.

*Uppafturvenjing*
Uppafturvenjing skal verða skipað um alt landið sum ein serlig eind undir Nærverkinum sambært álitinum um Endurvenjing fyri fólk við førleikatarni. Miðstøðir fyri uppafturvenjing skulu verða skipaðar á Klaksvíkar og Suðuroyar sjúkrahúsi.

*Fyribyrgjandi heilsutænastur*
Førleikamennandi skeið í skúlamedisini skulu verða veitt kommunulæknunum, og